

- Hendan skyldan fyri borgaran verður mett at vera eitt minni inntriv sæð í mun til nyttuna, sum samfelagið fær av úrslitinum av manntalinum, sigur Øssur Winthereig, sum sipar til, at alt Føroya fólk kann fáa ágóðan av tí, sum spyrst burturúr hagtalslýsingini í heyst.

### Brot á ST-sáttmála

Men tað er ikki bara bleytir upplýsingar, sum vit føroyingar væntandi skulu hosta upp við í heyst.

Umframt teir obligatoriskum upplýsingarnar um navn, bústað, p-tal og kyn hava øll skyldu til at svara nøkrum heldur eymari spurningum.

Vit at verða bæði biðin um at meta um okkara heilsustøðu í mun til aldurin, umframt at hvør einstakur skal upplýsa, um eins dagliga virki er avmarkað orsakað av einum heilsutrupulleika ella breki, sum hevur varað ella væntandi fer at vara í minsta lagi 12 mánaðir.

- Her fert fert tú alt ov nær persónligum upplýsingum, heldur Jørgen Niclasen.

Tað sama heldur løgfrøðiligi ráðgevin hjá løgtingsumsitingini.

"At krevja, at borgarar svara upp á henda spurning kann verða í stríð við grein 22, 2 í ST-sáttmálanum um rættindi hjá fólki, ið bera brek", skrivar Birita Ludvíksdóttir, sum í notatinum vísir á, at ST-limalond sambært sáttmálanum skulu verja rættin at dylja persónligar og heilsuligar upplýsingar hjá fólki, ið bera brek, á jøvnum føti við onnur.

Hon mælir ístaðin til, at fólk velja sjálvi, um tey ynskja at svara spurningunum um heilsustøðuna – eins og tað er sjálvboðið at svara teimum spurningum, sum snúgva trúgv.

### Grønt ljós frá MBF

Øssur Winthereig, kunningarráðgevi fyri verkætlanina, er ikki samdur við fólkafloksformannin og løgfrøðiliga ráðgevan í løgtingsumsitingini um, at báðir spurningarnir kunnu stríða við nakran ST-sáttmála.

- Hesir spurningar verða eftir ST-vegleiðingini ikki hildnir at vera viðkvæmir spurningar, sigur Øssur Winthereig, sum vísir á, at eisini onnur land hava somu spurningar við í teirra spurnabløðum.

Hann leggur afturat, at spurningarnir ikki eru brot á ST-sáttmálan um rættindi hjá fólki, ið bera brek, tí talan er um sonevnda "sjálvuppfatan" av egnari heilsu.

- Talan er ikki um diagnosur ella um, hvørja sjúku ella hvørji brek, svararin hevur. Úrslitið verður ein hagfrøðilig mynd av, hvussu føroyingar fata sína egnu heilsu og møguligar avmarkingar í dagligum virki, sigur Øssur Winthereig.

Harumframt vísir kunningarráðgevin hjá Manntali á, at Meginfelag Brekað í Føroyum hevur havt spurningin, sum viðvíkir brek, til umrøðu, og felagið hevði einki at finnast at.

- Tvørturímóti var áhugi fyri fleiri spurningum um brek og sjúkur. Men Manntal helt, at fleiri spurningar kundu fatast sum viðkvæmir, sigur Øssur Winthereig, sum leggur afturat, at eisini Dátueftirlitið hevur góðkent spurningarnar í spurnablaðnum.

## Umfatandi spurningar

**Tað er rættiliga ymiskt, hvat stendur í spurnablaðnum, sum allir føroyingar væntandi hava skyldu at svara í heyst í samband við umfatandi fólkateljingina.**

*Her er nakrir av teimum heldur eymu og øðrvísi spurningunum í spurnablaðnum, sum var nýtt til royndarfólkateljingina í fjør heyst:*

**Hvør er húsaleigan?**
**Hvussu nógvir fermetrar av býlinum eru óinnrættaðir?**
**Hevur býlið vesi?**
**Hevur tú systkin ella hálvsystkin í útlondum?**
**Hvat var fyrsta málið, tú lærdi heima?**
**Vart tú heima við hús náttina til 11. november?**
**Hvussu er heilsan hjá tær í mun til aldurin?**
**Bert tú nakað varandi brek?**
**Hvørja kristna kirkju/fríkirkju ella samkomubólkar hevur tú tilknýti til?**
**Hvørja trúgv hevur tú?**
**Hvussu væl dugir tú føroyskt?**
**Hvussu lýsir tú tín tjóðskap?**
**Gjørdi tú nakað húsligt arbeiði heima seinastu 7 dagarnar?**
**Ert tú limur í nøkrum fakfelagi?**